Kvívík 14. novembur 2018

# Ársfrágreiðing hjá skúlastýrinum 2018

## Innihald

1. Kunning um skúlastýrið.
2. Yvirlit yvir virksemið hjá skúlastýrinum hetta árið.
3. Evnisdagur hjá *Heim og Skúli* 3. februar.
4. Garðdagurin 19. juni.
5. Skúlastýrisfundur við Vestmanna skúlastýrið 26. septembur.
6. Starvsfólkadagur fyri starvsfólk í Kvívíkar skúla 21. novembur
7. Mál á skúlastýrisfundum hetta árið.

## 1. Kunning um skúlastýrið:

Skipanin við skúlastýrum í føroyskum fólkaskúlum byrjaði aftur í 1977, og fevnir arbeiðssetningurin hjá skúlastýrunum í stuttum yvir hesi øki:

- Virka sum bindilið millum skúla og foreldur
- Samstarvsfelagi hjá leiðslu skúlans
- Áseta meginreglur og hava eftirlit við øllum virksemi skúlans
- Samstarva við kommunustýrið um skúlabygnað og fíggjarligu- og hølisligu umstøðurnar í skúlanum
- Umboð í setanarnevnd í samband við at seta lærarar og skúlastjóra

Fundarfrásagnirnar frá stýrisfundunum kunnu lesast inni á skúlans heimasíðu: http://www.kvivikarskuli.fo/index.php/skulastyrid og í hesi ársfrágreiðing, sum verður løgd út á heimasíðuna aftaná felags foreldrafundin, kann lesast ein samandráttur av høvuðsmálunum frá skjótt farna ári.

Í tíðarskeiðinum 1. jan. 2017 til 31. des. 2020 sita hesi í skúlastýrinum:

| Navn | Umboðar | Telefon | T-postur |
|---|---|---|---|
| Sunrit Niklasdóttir, forkvinna | Foreldur | 27 67 88 | sunrit.niklasdottir@gmail.com |
| Nelly H. Debes, næstforkvinna | Foreldur | 50 60 64 | nelly@pm.fo |
| Marjun Danielsen | Foreldur | 22 33 56 | marjun.danielsen@skulin.fo |
| Ragnar Isaksen | Kommunu | 50 90 50 | isaksen509050@gmail.com |
| Vivi Davidsen | Kommunu | 23 19 98 | vivi@faroeagency.fo |
| Hallgerð Hansen 2018-2019 | Lærarar | 72 33 68 | hallgerd.l.hansen@skulin.fo |
| Høgni Warberg, fastur skrivari | Skúlaleiðari | 29 24 22 | hoegni.warberg@skulin.fo |
| Varðaumboð eru: | Morten H. Petersen, Sigrun Helga Magnussen og Elisa Abrahamsen | | |

## 2. Yvirlit yvir virksemið hjá skúlastýrinum hetta árið:

10. januar: Fundur við skúlastýrið í Vestmanna

3. februar: Evnisdagur hjá *Heim og skúli*

21. februar: Skúlastýrisfundur

18. apríl: Skúlastýrisfundur

30. mai: Skúlastýrisfundur

19. juni: *Garðdagur* fyri foreldur, børn, lærarar og skúlastýrið

5. septembur: Skúlastýrisfundur

26. septembur: Fundur við skúlastýrið í Vestmanna

14. novembur: Felags foreldrafundur

21. novembur: Starvsfólkadagur fyri starvsfólk í Kvívíkar skúla

## 3. Evnisdagur hjá *Heim og Skúli* 3. februar:

Foreldrafelagið *Heim og Skúli* er landsfelagið fyri foreldur og verjar í føroyska fólkaskúlanum. Felagið var stovnað 10. juni 2006 og hevur til endamáls at menna samstarv millum heim, skúla og aðrar samfelagsstovnar við tí fyri eyga at betra korini hjá skúlabørnum.

Link til heimasíðuna hjá *Heim og Skúli*: https://heimogskuli.wixsite.com/heimogskuli

3. februar var evnisdagur á Skúlanum við Løgmannabreyt, og har hevði Karolina Matras eina áhugaverda framløgu/kjak við yvirskriftini: "Hvussu kunnu vit sum foreldur styrkja málmenningina hjá børnum okkara?"

Karolina eri námslektari á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Hon er útbúgvin fólkaskúlalærari, serlærari við m.a. mál/talu sum sergrein og sálarfrøðingur. Karolina hevur granskað í máli sum menningarmiðil og undanførleika fyri lesimenning og í lesiundirvísing hjá børnum í byrjanarundirvísingini.

Framløgan sæst her:

https://docs.wixstatic.com/ugd/a31659_c6e8abd7a9de4285b45002887b4f6b3e.pdf

## 4. Garðdagurin 19. Juni

Tíverri var afturvendandi spæli- og hugnadagur fyri foreldrum, børnum, lærarum og skúlastýrinum í ár avlýstur vegna veður. Ætlanin er at hava dagin aftur næsta ár.

## 5. Fundur við skúlastýrið í Vestmanna 26. septembur

Vitjanirnar millum 4.-7. floksnæmingar í Kvívíkar og Vestmanna skúla vóru eftirmettar og semja varð um, at skipanin riggaði væl síðsta ár. Ætlan er at halda fram við hesum og uppskot er gjørt um, hvussu vitjanirnar kunnu skipast hetta skúlaárið.

Á fundinum hevði Súsanna Olsen, námslektari á Søgu- og samfelagsdeildini á Fróðskaparsetrinum eisini áhugaverda framløgu um samstarv millum skúlar, og hon tosaði millum annað um faktorar sum fremja og darva samstarvinum.

## 6. Starvsfólkadagur fyri starvsfólk í Kvívíkar skúla 21. novembur

Í tráð við rundskriv um meginreglur fyri skúlastýrið, er avgjørt at víðka fundin við lærararnar - sum var hildin fyrstu ferð í fjør - til at fevna øll starvsfólk í Kvívíkar skúla, har fokus er á sosiala samveru við undirhaldi og eini máltíð saman. Í ár kemur Niclas Heri Jákupsson at halda ein jaligan og stimbrandi fyrilestur fyri starvsfólkunum.

## 7. Mál á skúlastýrisfundum hetta árið

- *Málið við at nútímansgera gamla partin av skúlanum.*
  14. septembur sendi skúlastýrið nýggja áheitan til kommununa um at seta pening á fíggjarætlanina fyri 2019 til tekning av, hvussu hølini í gamla partinum av skúlanum kunnu gerast tíðarhóskandi. 17. septembur kom svar frá kommununi, at málið verður viðgjørt og skúlastýrið skal frætta aftur. Higartil hevur skúlastýrið einki hoyrt aftur frá kommununi.
- *2018: Ár fyri málmenning hjá børnum.*
  Nógv ymisk átøk hava verið í Føroyum hetta árið við denti á málmenningina hjá børnum og eitt av hesum átøkum eru seks nýggir faldarar við góðum ráðum til foreldur um, hvussu tey kunnu menna málið hjá børnum sínum. Faldararnir liggja allir á heimasíðuni hjá Kvívíkar skúla og kunnu frítt takast niður.
- *Ábøtur á vánaligu ljóðviðurskiftini í høvuðsgongini í skúlanum.*
  Kappar og gardinur eru keyptar og settar upp í høvuðsgongini við tí endamáli at bøta um vánaligu ljóðviðurskiftini, og harumframt eisini geva møguleika fyri at myrkaleggja samkomuhølið í gongini, tá tiltøk og annað skulu skipast.
- *Hjartastartarin,* sum áður hekk inni í skúlanum, er nú staðsettur uttanfyri við høvuðsinngongdina, soleiðis at tað altíð er lætt at koma framat honum.
- *Royndartíð við skipanini matpakkin.fo*
  Á skúlastýrisfundinum 5. septembur var avgjørt at byrja ein royndartíð frá 1. oktober við matarskipanini frá Gist og vist – matpakkin.fo. Hetta er

ein skipan, sum hevur virkað í Føroyum í hálvtannað ár og í løtuni eru umleið 20 skúlar við í skipanini. Síðan 24. septembur hava 153 bíleggingar verið og afturmeldingarnar higartil um skipanina eru sera jaligar. Leinkja til *matpakkin.fo* er á heimasíðuni hjá skúlanum.

- *Mjólkaskipan uppstartað.*
  Á skúlastýrisfundinum 5. septembur var somuleiðis avgjørt at arbeiða fyri at uppstarta mjólkaskipan í skúlanum. Øll foreldur fingu herfyri kunning um møguleikan fyri at melda næmingarnar til skipanina og higartil eru 26 næmingar í skipanini. Aftaná smærri byrjunartrupulleikar, hevur skipanin virkað sera væl.
- Í 2018 vóru rakstrarútreiðslurnar fyri skúlan áleið 325.000 kr. Uppskot um samlaðu fíggjarætlanina fyri 2019 er økt við 4000 kr - áleið 1 % - sum nøkulunda svarar til prístalshækkanina í samfelagnum.
- *Lærarasetanir fyri skúlaárið 2018-2019.*
  Súsanna Mortensen og Tórarinn á Rípuni eru farin í farloyvi hetta skúlaárið, og fyri tey eru ávikavist Maj-Britt Jacobsen, flokslærari hjá 4.-5. flokki, og Elna Sømark, flokslærari hjá 2.- 3. flokki settar. Harumframt verður á hvørjum árið søkt eftir lærara í eitt tíðaravmarkað starv til avlopstímar, og í tað starvið er Malan Petersen sett.

Vegna skúlastýrið

Sunrit Niklasdóttir, forkvinna